# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Hickersberger sá reytt

**Saman við týska venjaranum, Joachim Löw, varð Josef Hickersberger rikin upp á áskoðaraplássini, tá Eysturríki í gjár mátti lúta fyri Týsklandi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Stutt fyri hálvleiki hevði spanski Manuel Mejuto Gonzalez fingið nokk. Joachim Löw og Josef Hickersberg vórðu báðir sendir niðan á áskoðaraplássini, soleiðis at friður kundi valda við skiftisbeinkirnar*
*Mynd: Polfoto/AP*

Tað eydnaðist ikki hjá Eysturríki at skapa stóru sensatiónina, tá teir í gjár skulu royna at koppa stórabeiggjanum úr Týsklandi. Uppgerðin var avgerandi fyri báðar partar, tí við týska tapinum móti Kroatia var trýst eisini á stórveldinum, sum skuldi vinna, um teir skuldu vera vísir í at røkka næsta umfarinum í EM-endaspælinum.

### Drama á beinkinum

Og leingi livdi Eysturríki í vónini. Sæð burtur frá einum mest sum ótrúligum avbrennara hjá Miroslav Klose tíðliga í dystinum, so var rættiliga avmarkað, hvat týskarar megnaðu og vildu í dystinum.

Í so máta spruttaði Eysturríki meira, tá ferð eftir ferð royndu at flyta fólk fram móti týska brotsteiginum. Men har var størsti trupulleikin, at liðið vildi meira, enn teir megnaðu, og tí komu teir ongan tíð til teir heilt stóru møguleikarnar.

Og hjá venjarunum báðum stóð eisini nógv á. Somikið nógv, at Hickersberger og Löw stutt fyri hálvleik fingu marchordra frá spanska dómaranum, sum hevði fingið nóg mikið at teimum báðum kamphanunum.

Á vøllinum helt spælið fram, men tá Michael Ballack við eini frísparkskanón skoraði til 1-0, kámaðist vónin hjá heimaliðnum av álvara. Ballack hevði annars ein av sínum heilt friðarligu døgum, men frísparkið var væl eitt klassiskt dømi um, at teir stóru spælararnir megna at prógva sítt virði, júst tá tørvurin er størstur.

### Sterkir kroatar

Sigurin bar við sær, at Týskland vann seg víðari sum tvey'ari í bólkinum. Oddasessin tók Kroatia sær av, tá teir eisini vunnu triðja dystin í bólkaspælinum. Hesin varð móti Póllandi, sum varð sent heim við 1-0 tapi.

Og tann sigurin undirstrikaði enn eina ferð styrkina hjá Kroatia, sum fór úr bólkaspælinum við fullum stigatali. Um tað so er nóg mikið til at koma eins langt, sum Suker og vinir hansara gjørdu tað í HM-kappingini í 2000, er ein annar spurningur. Men Modric og hinir á kroatiska liðnum, anno 2008, hava helst sína greiðu fatan av hesum.

# EM fær børsin at sveiggja

**Tá stóru fótbóltstjóðirnar standa seg illa, gera partabrævamarknaðir teirra tað eisini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er óvæntaða úrslitið av eini umfatandi greining, sum norskir granskarar hava gjørt.

Øyvind Norli, sum er ein av granskarunum á liðnum, sigur, at teir hava kannað partabrævamarknaðirnar síðani 1973, og at talan er um púrasta greiðar tendensir.

- Talan er um dramatiskt fall í partabrævamarknaðinum, tá tey stóru londini tapa. Til dømis vil eitt tap í knock-out umførunum í HM-kappingini bera eitt fall upp á 0,38% við sær á marknaðinum í tapandi landinum. Hinvegin er ávirkan at kalla eingin í vinnandi landinum.

Norli sigur, at talan er um sveiggj, sum onga skilvísa frágreiðing hava, og sum tí helst eru úrslit av, at lagið hjá teimum, sum handla við virðisbrøvum søgnt sagt er verri, um landið hevur tapt ein týdningarmiklan dyst.

Og við at hyggja at dystarskránni fyri EM-kappingina, sum verður spæld í hesum døgum, eru norsku granskararnir komnir eftir, at sveiggini hesa ferð kunnu gerast serliga stór í Fraklandi, Italia, Spania, Turkalandi og Portugal, um hesi lond ikki standa seg nóg væl.

Sambært norska E24.no, so er talan ikki um nakað serskilt fyribrigdi innan fótbólt. Samsvarandi úrslit eru eisini staðfest við stórar kappingar í eitt nú rugby, cricket, íshockey og kurvabólti.

## EM-dystir

### Bólkur B

Eysturríki-Týskland 0-1 (0-0)
0-1: Michael Ballack, 49.

Pólland-Kroatia 0-1 (0-0)
0-1: Ivan Klasnic, 52.

### Komandi dystir

**Bólkur C**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 17.06 | 19.45 | Frakland-Italia |
| 17.06 | 19.45 | Holland-Rumenia |

**Bólkur D**

| | | |
|---|---|---|
| 18.06 | 19.45 | Russland-Svøríki |
| 18.06 | 19.45 | Grikkaland-Spania |